

Morten Carlsson, leiðari av kappingini:

# Kappingin hevur verið ein stór succes

**- Hetta hevur verið ein risastór succes, sum vit als ikki roknaðu við, sigur Morten Carlsson, fyriskipari av Stjerne for en aften, og hann leggur afturat, at í miðal hava 1,2 milliónir hyggjarar fylgt sendingunum**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Fyriskipararnir av sangkappingini Stjerne for en aften vóru eisini ógvuliga fegnir eftir at seinasta kappingin var liðug. Hetta er annað árið, at sjónvarpsstøðin DR skipar fyri eini slíkari kapping, og hyggjaratalið hevur verið sera stórt í ár.

Vit fingu orðið á Morten Carlsson eftir kappingina, og hann upplýsti, at í miðal hugdu 1,2 milliónir fólk eftir sendingunum, sum hava verið hvørt fríggjakvøld seinastu mánaðirnar. Í fjør var talið bert umleið 700.000.

- Alt prosjektið hevur umsett fyri fleiri milliónir krónur og skapt nógv arbeiðspláss. Í veruleikanum vóru vit ikki fyrireikað uppá so stóran áhuga frá almenninginum, men vit eru avbera glað fyri, at tað hevur gingið so væl, sigur Morten Carlsson.

**Góður møguleiki at gera vart við seg**

Sendingar í sjónvarpi so sum popstars á TV 2 og Stjerne for en aften á DR hava vundið uppá seg seinastu árini. Hóast nógv halda lítið um tílíkar sendingar, so er hetta ein góður møguleiki hjá sangarum at gera vart við seg, heldur Morten Carlsson.

- Hesi fólkini, sum hava verið á pallinum í kvøld, høvdu møguliga ongantíð fingið møguleikan fyri at vísa, hvat tey duga, um tað ikki var fyri eina slíka kapping, sum verður víst í sjónvarpinum, sigur Morten Carlsson.

- Tað er ein rúgva av evnaríkum sangarum, sum kanska ongantíð fáa høvi at standa á einum palli, og tað eru hesi, sum vit fegin vilja hava fatur á, sigur hann og vísir á, at mangan er tað ógvuliga torført at fáa fótin innum hjá teimum stóru plátufeløgunum, um tú ikki frammanundan hevur okkurt samband við feløgini.

Hann heldur, at styrkin við kappingini er, at hyggjararnir avgera alt, sum hendir. Teir gera av, hvør fer víðari, og hvør skal heimaftur.

Hann upplýsir, at Guðrun hevur millum sjey- og áttati framførlsur komandi tríggjar mánaðirnar, og trý tey fremstu í kappingini skulu hava fleiri konsertir saman.



*Natasja Crone*



# Móttøkan var eini drotning verdug

**Guðrun Sólja Jacobsen kom aftur sunnudagin. Móttøkan í Vágum var eini drotning verdug. Terminalurin var fullur av fólki, og eldri menn stóðu við eygunum fullum av tárum**

MÓTTØKA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:**
Heilt nógv fólk var komið á flogvøllin, tá Guðrun Sólja Jacobsen kom heim aftur við flogfarinum hjá Atlantsflog seinnapartin sunnudagin.

Úti á vøllinum vóru umboð fyri Atlantsflog og handaðu Guðruni blómutyssi, eisini og pressan var væl umboðað.

Í komuhøllini varð sagt frá, hvat hendi uttan fyri, áðrenn farið varð út í sjálva farstøðina. Uttan fyri hoyrdust spakir tónar frá Suðuroyar Gospelkóri, sum Guðrun dagliga syngur við. Guðrun var spent og glað, men eisini rímiliga avslappað kortini.

So fór hurðin upp og Guðrun trein út í alla mannamúgvuna. Fólk í øllum aldri vóru komin at taka ímóri. Veittrað varð við fløggum, eins og nógvar ballónir vóru at síggja. Rómurin var øgiligur.

Við báðum hondum yvir høvd gekk Guðrun beinleiðis upp á pallin, har kórið bíðaði. Heilsast skuldi upp á vinirnar.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflogi, helt røðu og handaði Guðruni eitt tíggjutúrakort frá Atlantsflogi.

Síðan fekk kórleiðarin mikrofonina, sum hann beinanveg lat Guðruni við teimum orðum, at nú ein stjørna var í kórinum, var ikki annað enn rímiligt, at hon fekk mikrofonina.

Tað fekk hon so, og aftur stóðu fólk og táraðu. Eldri menn við eygunum fullum.

Eftir framførsluna fekk Guðrun eina løtu at skriva autgrafar í, áðrenn farið varð út til til tyrluna, sum flutti Guðruna til Havnar, har móttøka var í SMS.



*Gurðrun Jacobsen er júst komin inn í terminalin í Vágum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*





## Stóran týdning fyri Føroyar

**Høgni Hoydal, virkandi landsstýrismaður í mentamálum, er ikki í iva um, at úrslitið hjá Guðruni Sólju Jacobsen fer at hava ein stóran týdning fyri Føroyar í framtíðini**

STJØRNUFAGNAÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Virkandi landsstýrismaðurin í mentamálum, Høgni Hoydal, heldur, at úrslitið hjá Guðruni Sólju Jacobsen, kann fara at fáa ein ómetaliga stóran týdning fyri Føroyar.

– Um Guðrun heldur fram á henda hátt, so fer hetta at hava ein ómetaliga stóran týdning fyri Føroyar. Hetta kemur at eggja øðrum til at halda seg framat, og eisini fíggjarliga fer hetta at hava nógv at siga, sigur Høgni Hoydal, og vísir á londini rundanum okkum, sum hava sett stjørnur á heimskortið.

Hann sigur eisini, at mentanarpolitikkurin her í Føroyum eigur at stuðla listafólki og harundir sjálvsagt tónleikarunum.

– Vit arbeiða við hesum í Mentamálaráðnum í løtuni, og arbeitt hevur við tí leingi at fáa eina betri skipan fyri tónleikararnar, so vit frá byrjan kunnu hjálpa teimum á leið, og ala framburð úr teimum fólkunum vit hava her. Vit kunnu nevna fleiri, sum av sínum eintingum hava megnað at vunnið seg fram á altjóða marknaðinum, sigur landsstýrismaðurin, og nevnir Guðrun, Brand Enni, Teit Lassen, Sunleif Rasmussen og Eivør Pálsdóttir, sum nøkur dømi, um at fólk við egnum vilja og stremban hava vunnið seg fram.

– Hatta við Guðrun var eitt stórt bragd, og ongin ivi skal vera um, at hon sópaði alla mótstøðu av borðinum fríggjakvøldið.

Landsstýrismaðurin sigur eisini, at Guðrun er og hevur verið eitt fyrimyndarligt andlit fyri Føroyar uttaneftir, og ivast hann ikki í, at hon fer at megna tað eins væl í framtíðini.